Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Tjóðarhátíðin – ólavsøkan

## *Oddagrein*

Í DAG og í morgin er tjóðarhátíð okkara – ólavsøka. Onnur lond hava sín tjóðardag, sum tey hald við røðum, skrúðgongum, tónleiki, bjóri og skemti kring alt landið. Vit hava afturímóti eina tjóðarhátíð, sum bara verður hildin í høvuðsstaðnum, og sum fevnir víða. Ja, bara hugflogið setir mark fyri, hvussu fjølbroytt ólavsøkan er.

MEN hon hevur eisini nakað grundleggjandi, sum savnar tjóðina og sum er við til at skapa tann føroyska samleikan. Eitt er summarstevnan við tjóðarítrótt okkara, kappróðrinum. Eitt annað er ólavsøkugudstænastan við skrúðgonguni, sanginum á Tinghúsvøllinum og løgtingssetanini ólavsøkudag.

HETTA er tann formligi parturin, sum vit hava hildið fast um í mong ár, og sum vit eisini fara at halda fast um, tá vit hava fingið eina nýggja stjórnarskipan, sum alt bendir á, at vit fara at fáa. Gudstænastan og løgtingssetanin ímyndar kristna grundstøðið hjá føroysku tjóðini og tann stjórnarliga myndugleikan her á landi.

Hetta er sjálv hátíðarløtan, sum tíverri alt ov fá fáa við, tí ólavsøkuaftan gjørdist ov drúgvur ella tí at ov nógv var innanborða. Ólavsøkan er jú eisini veitslan fram um allar aðrar veitslur. Blíðskapurin og versskapurin er góður og ímyndar føroyskan hugburð, tá hann er bestur. Tað er jú eisini á ólavsøku, at mong hittast á fyrsta sinni – í dansi, í gonguni oman eftir og niðan eftir, í veitslulag ella í samkomum.

ÓLAVSØKAN er ein partur av mentan okkara, og í øllum hurlivasanum eru mong mentanartiltøk á skránni. Tann stóra listaframsýningin er eitt. Sangurin á Tinghúsvøllinum er eitt annað. Andaligi sangurin hjá samkomunum er eitt triðja. Ólavsøkukabarettin er eitt og tann stóra poppkonsertin er upp aftur eitt annað. Og so framvegis og so framvegis.

SAMANUMTIKIÐ er ein stórfingin hátíð, sum nógv gleða seg til og tí stevna til Havnar, samstundis sum nógv havnarfólk rýma undan og út á bygd. Tað er jú eisini tey, sum halda, at ólavsøkan er nakað tvætl, ein drukk- og rukkuveitsla, sum ein mentað tjóð ikki eigur at góðtaka. Hesi sakna kanska tað meira fólksliga, sum samanbindur fólk í tí stilla.

MEN ólavsøkan er ólavsøkan. Vøkan til minnis um Ólavs hin Heilaga. Karmarnir eru har og so stendur tað upp til tann einstaka at hava eina góða ella minni góða ólavsøku. Sjálvandi ynskja tey flestu, at rok og ólevnaður er sum minst, og at hátíðardámur saman við tí sømiliga veitslulagnum er í hásæti. Og við hesum orðum ynskir Sosialurin øllum føroyingum – á bygd og í bý – eina góða ólavsøku.

***Sosialurin***

# Randarsól við trimum løgum

RÚNAR REISTRUP



*Randarsól Siggertsen hevur eftir tíggju ára útlegd í Danmark givið út stakfløgu í Føroyum.*

Nú um ólavsøkuna kemur ein nýggj føroysk singlefløga út. Tað er 29 ára gamla Randarsól Vilhelmsen, ið fyri fyrstu ferð gevur út fløgu.

Á fløguni eru trý løg, ið Randarsól sjálv hevur gjørt orð og lag til. Hon sigur, at løgini á fløguni eru skrivað út frá upplivingum, hon hevur havt .

Stendur tað til sangarinnuna, er hendan stakfløggan bert byrjanin. Hon hevur longu sett nøsina upp ímóti einari lívsleið innan tónleik. – Ætlanin var bara at gera eina demofløgu, sum eg so kundi senda út til plátufeløg í Danmark, men Róin Siggertson, ið hevur produserað fløguna, helt at tað var vert at gera eina rættiliga fløgu og geva hana út, sigur Randarsól Vilhelmsen.

Nú fløgan er liðug, ætlar Randarsól at seta seg í samband við donsk plátufeløg og vísa teimum fløguna. Við hesum vónar hon at leggja lunnar undir eina fløguútgávu í Danmark.

Fløgan er upptikin í studionum hjá Róin Siggertson í Herlev.

Randarsól stendur sjálv fyri fløguútgávuni. Plátufelagið Tutl marknaðarførir hana.

# Bømloteatrið úr Noregi á Føroyaferð

*Týsdagin 1. august 2000 kl. 19.00 verður leikurin „Kristnu Kongarnir á Moster“ framførdur í Norðurlandahúsinum.*

**Eitt sindur um leikin:**
"Mosterspælið" sigur frá um eina dramatiska broytingartíð í Noregssøgu, har trúgv, - gomul og nýggj - møtast. Sjónleikurin sigur frá einum tríatiára skeiði - nevniliga frá 995, tá ið Ólavur Trúgvason kemur heim fyri at krevja sín kongsarv og fyri at kristna landið og til 1024, tá Ólavur Haraldsson fekk Kristnu rættarskipanina lýsta á Mostertingi. Soleiðis kom Moster at verða ein søguligur staður.

Mosterspælið er eitt samstarv millum nógv fólk, flestu teirra amatørar. Onkur yrkisleikarai er eisini við. Leikurin hevur verið spældur í Moster Amfi hvørt summar síðan 1984, vanliga á hvítusunnu, og o.u. 85.000 hava sæð leikin hesi árini.

Norska dagblaðið Aftenposten segði um Mosterspælið:

„Norskt mentanarlív blómar sum ongantíð áður“, segði Åse Kleveland, mentamálaráðharri. „Tann, sum var áskoðari á Amfipallinum í Moster, tað stórsligna útisjónleikarahúsið í Bømlø við meiri einn 1500 fólkum og upplivdi „Kristnu Kongarnar í Moster“, sum Johannes Heggland hevur skrivað, fekk eitt stórsligið prógv fyri, at hetta er sonn tala.... Ein avbera stórsligin framførsla.“ Soleiðis skrivaði Eilif Straume.

Leikurin er í trimum pørtum.

Í **1. parti** liva fólk enn við síni gomlu trúgv. Árið er 995. Ólavur Tryggvason kemur siglandi vestanífrá og krevur, at fólkið skal taka seg til kong og taka við kristnari trúgv. Hæddarpunktið er hin fyrsta kristna messan á norskari jørð. Fólk taka við nýggju trúnni, men nøkur fella frá.

Í **2. parti** kemur Ólavur Tryggvason, kongur, aftur til Moster í árinum 997 og stevnir fólkinum til tings at noyða tey at vera lýðin móti kongi og kristnu trúnni.

Í **3. parti** fara hendingarnar fram í árinum 1024. Ólavur Haraldsson, seinni Ólavur Halgi, kemur við fylgi sínum til Moster, har "Kristinrætturin" verður lýstur.

Í ferðalagnum eru 80 fólk, leikarar og hjálparfólk. Tey koma higar úr Íslandi, har leikurin skal spælast á Reyholti Ólavsøkudag í sambandi við 1000 ára hágtíðarhaldið hjá íslendingum. Hjástødd undir sýningini í Reyholti verða norsku kongshjúnini, íslendski forsetin, og aðrir gestir.

Sýningin í Norðurlandahúsinum er í sambandi við okkara 1000 ára hald fyri Kristnanini.

## „Minn meg á“ bókin komin

*26. juli varð nýggja „Minn meg á“ bókin borin út í handlarnar*




Nú er so nýggja „Minn meg á“ bókin aftur komin í handlarnar fyri tíðarskeiðið 2000/2001. Bókin varð borin út í handlarnar 26. juli, og í komandi viku verður hon at fáa í bókasølum og á øllum Statoil støðum kring landið.

Søluprísurin fyri bókina er, eins og í fjør, 55 kr, og fyri hvørt eintak ið selt verður, fær Barnahjálpargrunnurin fimm kr. Eisini ber til at ogna sær eina A2 plakat av permuni fyri 25 kr, har bókin annars fæst.



# The Grand Old Man við feskum yrkingum

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Regin Dahl. Punktum. Hann er føddur í desember 1918 og klokkan fimm í dag letur hann enn eitt yrkingasavn av hondum. Og talan er um spildurnýggjar yrkingar. Seinastu mánaðarnar hava hansara ristandi hendur meitlað, og brennandi skapanarhugur evnað 30 yrkingar. Og Regin er orðasmiður um ein háls. Próstasonurin við vakra umhvørvinum í Sandagerði sum grundvølli hevur aftur spískað blýantin. Tann langtandi útisetin, heimsborgarin, ríkar okkum aftur við flógvum orðum, frá árum ið sleptu, og kærleikin er afturvendandi, sama ger um hann er vendur móti føðilandinum, ella um hann fer millum mann og kvinnu, lúrin, deiligur og sjarmerandi.

Og lesarin sleppur heilt inn um dyrnar hjá Regini við nýggja yrkingasavninum. Á aðrari síðuni stendur yrkingin prentað, og á hini er avrit av handritinum til yrkingina, so tú kann merkja bæði lag og ólag, tá orðini eru fest á blað. Deiliga privat og ein fongur hjá teimum, sum dáma at lesa um rithøvundar. Eitt petti av eini ævisøgu, áðrenn ævin er av.

Regin hevur verið ein sera skapandi maður, og hóast hann kanska mest er at hoyra í dag sum tónasmiður, so standa hansara yrkingar ikki aftan fyri í dygd.

Hann er sín egin, hann er djarvur, og hann yrkir neyvan fyri at tekkjast.

Í sambandi við at yrkingasavnið „Smámunir“ kemur út, verður samkoma í Listgallarí Vágsbotn, har høvundurin verður til staðar. Har verða eisini onnur yrkingarasøvn, sum hann hevur latið úr hondum til keyps.

Dótturin Anna Maria hevur prýtt bókina við tekningum, og hon sýnir sjálv fram á Ólavsøku í Vágsbotni.



*Regin Dahl. Mynd: Jens Kr. Vang*

# Fýra nýggj á ólavsøkuframsýningini

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Fýra fólk eru fyri fyrstu ferð við á eini listaframsýning, tá listaframsýningin í Listaskálanum letur upp Ólavsøkuaftan.

Hósdagin stríddust tey við at heingja tær seinastu myndirnar upp og ein av fyriskiparunum, Jens Fredriksen, sigur, at framsýningin verður spennandi í ár.

Ólavsøkuframsýningin hevur verið hildin í mong ár, og hon er sera væl umtókt. Nógv fólk vitja.

Framsýningin er sensurerað, og øll sleppa ikki við. Ein trímannanevnd velur myndirnar. Nógv dugnalig listafólk hava nýtt Ólavsøkuframsýningina sum ein pall fyri at koma víðari á skapandi leiðini. Á framsýningini eru altíð verk av okkara fremstu listafólkum blandað saman við teim nýggju



*Jens Kr. Vang*

Framsýningin er opin á Ólavsøku frá klokkan tvey seinnapart til klokkan átta á kvøldi.

